# Fiskaframsýning á ólavsøku

**Føroya Akvariufelag fer at sýna fram akvariur og fiskar á ólavsøku. Tey vitjandi sleppa at døma um, hvat vakrasta akvariið er**

FRAMSÝNING

Føroya Akvariufelag fer á ólavsøku at sýna fram í hølunum hjá Lützens Foto í Sjúrðargøtu. Framsýningin er opin frá fríggjadegnum 27. juli til ólavsøkudag. Hvønn dag frá klokkan 14.oo til 18.oo, sigur felagið í tíðindaskrivi.

Á framsýningini verður møguleiki at síggja bæði teir vanligu, fremmandu akvariufiskarnar, fólk kenna, og føroyskar fiskar. Bæði salt- og feskvatnsfiskar. Eisini verður okkurt akvarium, sum fer at hava saltvatnsdjór, sigur Akvariufelagið í tíðindaskrivinum. 14 akvariur í ymsum støddum verða sýnd fram í hølunum hjá Lützens Foto um ólavsøkuna.

Tey vitjandi fara at velja vakrasta akvariið. Tað verður gjørt við at skriva nummarið á akvarinum á atgongumerkið, sum lagt verður eftir. Hetta virkar samstundis sum lutaseðil, sum millum annað gevur møguleika at vinna ein litprentara frá Farodane.

**ej**

# Ólavsøka í Føroyahúsinum

**Eisini í Keypmannahavn ber til at halda ólavsøku og hoyra kappróður, um tað ikki er gjørligt at vitja klettarnar tjóðarhátíðina**

ÓLAVSØKA
*Dagfinn Olsen*

Sum vanligt hevur verið undanfarin ár, verður aftur í ár skipað fyri ólavsøkuhaldi í Føroyahúsinum í Keypmannahavn.

Ólavsøkuaftan letur kaffistovan upp klokkan 12 við matsølu og tónleiki. Kokkurin Stina Gudmundsdóttir borðreiðir við buffet.

Klokkan 14 er fernisering. Arngerð Joensen sýnir fram oljumálningar. Húsið bjóðar okkurt at leska seg við og tónleikur verður at hoyra.

Frá klokkan 16 verður kappróðurin útvarpaður á báðum hæddum í Føroyahúsinum.

Klokkan 18 er ólavsøkusetan á skránni. Felagssangur er á skránni og føroyski borgarstjórin í Gundsø, Jens Muller, heldur ólavsøkurøðuna. Hann er ættaður úr Havn.

Klokkan 18:30: Báðar dagarnar ger kokkurin Stina leskiligt buffetborð. Kostnaður 100 krónur, tvey góð vínsløg á 85 ella 115 krónur.

## Alex og Axel

Á kvøldi klokkan 20:30 syngur Alex Bærentsen og Axel Eysturstein spælir.

Frá klokkan 22 spælir Fuse. Hetta eru Kristina Heldarskarð og Axel Eysturstein. Kostnaður 50 krónur.

## Trubadurur vitjar

Ólavsøkudag letur kaffistovan upp klokkan 14. Umframt smurt breyð, verður okkurt til børnini báðar dagarnar.

Klokkan 17 er guðstænasta í Eliaskirkjuni, har Torben Johannesen prædikar. Torben er ættaður úr Fuglafirði og er fyrrverandi háskúlastjóri.

Frá klokkan 18 til 20 er buffetborð.

Klokkan 20 byrjar kafékvøld við sangi og heldur hetta fram til klokkan 23. Trubadururin Stanley Samuelsen, ið er ættaður úr Fuglafirði, syngur. Ragnar Jóhansen, lærari í Nakskov, heldur midnáttarrøðuna. Ragnar er ættaður úr Vági.

Soleiðis kemur ólav søkuhaldið í Føroyahúsinum at enda. Hvørt ein so er útiseti ella er vitjandi á flatlondum, so er eingin orsøk at lata ólavsøkuna fara framvið, um ein er nærhendis høvuðsstaðnum.

# Ólógligir gággufiskarar á Oyndarfirði



*Myndin sýnir, hvar tveir bátar regluliga plaga at fiska gággur fram við syðra landinum á Oyndarfirði*

**Hóast Oyndarfjørður er stongdur orsakað av ILA smittu, liggja fremmandir bátar á firðinum og fiska gággur. Landsdjóralæknin kennir einki til málið**

GÁGGUVEIÐA
*Edvard Joensen*

At kalla dagliga liggja tveir fremmandir bátar á Oyndarfirði og fiska gággur, hóast tað er ólógligt. Gjørt er vart við óskilið, men einki hendir.

Oyndfirðingar ilskast um, at fremmandir bátar liggja og fiska á Oyndarfirði og síðan fara av aftur firðinum, hóast stongsulin, sum lýstur er. Sjálvir sleppa teir bara út at fáa sær kók, men mugu ikki fara út av firðinum.

Talan er um tveir bátar úr Fuglafirði, sum fiska gággur, sigur Árni Joensen, borgarstjóri í Oyndarfirði. Annar er ein ljósur 20-tonsari, bygdur upp í øðrum borðinum, meðan hin er ein myrkur bátur við øðrum sniði.

Árni Joensen sigur, at hann hevur gjørt vart við hetta hjá Fuglafjarðar Kommunu og hjá havnarmyndugleikunum í Fuglafirði. Hann sigur seg eisini vita, at menninir hava fingið boð frá havnarmyndugleikunum um at gevast. Men tað tykist ikki, sum teir lurta eftir tí, sigur borgarstjórin í Oyndarfirði.

## Ringar royndir

Tá Sosialurin vendi sær til landsdjóralæknan at frætta nærri um støðuna, varð sagt, at hetta kendu tey als einki til.

Bjørn Harlou, landsdjóralækni, er í summarfrí. Men Peter Østergaard, djóralækni, segði, at hann als einki hevði frætt um hendan fiskiskapin á Oyndarfirði.

– Men tað er púra greitt, segði hann, at hatta er ólógligt. Og so bað hann blaðmannin siga sær frá, um vit frættu nakað meira!

Árni Joensen, borgarstjóri í Oyndarfirði, váttar, at hann hevur ikki boðað landsdjóralæknanum frá. Og tað kemst av, sigur hann, at hann hevur so mikið ringar royndir av Vinnumálastýrinum, sum Landsdjóralæknaembætið liggur undir, at hann beinleiðis heldur tað vera nyttuleyst at at siga frá.

Hann bað um hálp frá Vinnumálastýrinum, at sóttreinsa bátarnar, sum lógu í Oyndarfirði, tá ILA sjúkan varð staðfest. Men svarið hann fekk frá aðalstjóranum var, at tað hevði Vinnumálastýrið ikki møguleika fyri. Tey høvdu ivaleyst at gera við lógarsmíði, fekk hann at vita.

## Reinsa sjálvur

Tað heldur borgarstjórin í Oyndarfirði vera vánaliga grundgeving, tí honum vitandi eru fleiri djóralæknar í starvi hjá Vinnumálastýrinum. Og onkur teirra mátti kunnað komið ein dag norður at staðið fyri sóttreinsan av bátunum, sum ætlaðu sær burtur av firðinum, soleiðis at arbeiðið varð gjørt forsvarligt.

Men so varð ikki. Hinvegin fekk hann sendandi við telefaksi eina rúgvu av oyðibløðum, har hann sum borgarstjóri og myndugleiki í Oyndarfirði kundi skriva undir, at hann hevði sóttreinsað bátarnar.

– Men hvussu í Harrans navni skuldi eg tað? spyr Árni Joensen. Eg eri ikki veterinermyndugleiki og havi ikki førleika til slíkt!

Síðan eru summir bátar rýmdir úr Oyndarfirði og koma ikki aftur, meðan aðrir verða hangandi og sleppa ikki longri burtur enn eina snørislong úr landi. Og undir ongum umstøðum út á Djúpini at fáa sær eitt kók.

Og enn argar tað oyndfirðingar, at fremmandi menn sigla út og inn av Oyndarfirði, sum teir vilja, hóast stongsul er galdandi.

Eftir stendur so spurningurin, um onkur enn er í bygdini, sum dugir at gera teir til stein, soleiðis sum tað hendi kendu ófriðarskipunum á sinni, sum enn standa og rilla á Oyndarfirði.

# Bjørk kókar sukurlátu á Kgl. Teatrinum

**Bjørk skal møguliga framføra á Kgl. Teatrinum í Keypmannahavn. Nýggja fløga hennara spreingir aftur mørk og er operakend. Fløgan snýr seg um vetrardvala, at kóka sukurlátu og at lesa yndisbøkur**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Arbeitt verður við ætlanum um, at Bjørk skal framføra á Kongaliga Teatrinum í Keypmannahavn. Hetta er hennara egna ynski.

Enn eru ætlanirnar ikki endaliga komnar á pláss og eingin váttar nakað hesum viðvíkjandi, skrivar Jyllandsposturin.

## Bjørk fer um mørk

Sagt verður, at við nýggju og leingi væntaðu fløguni, ið nevnist Vespertine, fer Bjørk aftur um mørk á listaleið síni.

Fløgan hevur eitt huglag, ið ein skapar heima við hús við vinum og tí einasta eina, sigur Bjørk við Billboard. Hon metir, at tónleikurin verður trupul at framføra á palli.

Fløgan snýr seg um at kóka sukurlátu, vetrardvala og at lesa yndisbøkur. Hetta huglag er ikki lætt at raka í stórum hølum, og vil eg tí leika í smáum hølum, sigur Bjørk, ið skal leika í fleiri kendum operahúsm í Evropa.

Vespertine kemur úr 27. august og tvey av løgunum hevur danski Opiate, alias Thomas Knak, framleitt.



# Skaldið úr Skálavík á Landsbókasavninum

**Í ár eru liðin 100 ár síðani skaldið og rithøvundurin Heðin Brú varð føddur. Í hesum sambandi letur upp stór handrita- og bókaframsýning á Landsbókasavninum. Í tilfarinum eru at finna frumritini til nakrar av týdningarmestu gimsteinunum í føroyskum bókmentum**

BÓKMENTIR
*Dagfinn OIsen*



*Landsbókasavnið sýnir nú fram frumhandrit eftir skaldið Heðin Brú*

Fríggjadagin 27. juli, tað er í morgin, letur upp framsýning við handritum og bókum eftir Heðin Brú á Landsbókasavninum.

Tá sýningin letur upp fyri almenninginum klokkan 16, syngur Havnarkórið undir leiðslu av Ólavi Hátún Læraraskúlakantatuna Fedranna Tala. Heðin Brú yrkti og Hans J. Højgaard gjørdi lagið.

Framsýningin hevur fingið heitið Skaldið úr Skálavík.

## Frumrit til bókmentagimsteinar

Fyrr í ár varð stórfingin handritagáva latin Føroya Landsbókasavni í varðveitslu. Tað eru børnini hjá Heðini Brú, sum hava latið eitt stórt savn av handritum, uppritsbókum, brøvum og øðrum skjølum, ið lógu eftir pápa teirra. Í tilfarinum er eisini eitt brævasavn upp á eini 2000 brøv, skrivað av vinum og kenningum í Føroyum og uttanlands.

Tað mesta av tilfarinum er nú skrásett, men á framsýningini ber bert til at síggja lítlið úrval. Í vavi fylti gávan upp í 7 kuffert og 5 pappeskjur.

Í tilfarinum eru at finna frumritini til nakrar av týdningarmestu gimsteinunum í føroyskum bókmentum, nevnast kunnu skaldsøgurnar Lognbrá, Fastatøkur og Feðgar á Ferð. Eisini eru handrit til nógvar av stuttsøgunum og týðingunum, ið eru eftir Heðin Brú.

## Til november

Forvitnisliga framsýningin letur upp í morgin klokkan 16. Hon er opin ólavsøkuaftan og ólavsøkudag frá klokkan 14 til 20. Framsýningin Skaldið úr Skálavík verður standandi á Landsbókasavninum til 1. november.

# Ein sera stórur veðrur til ólavsøkuna



Ein stór øl er komin á marknaðin. Tað er Føroya Bjór, ið hevur sent eitt nýtt snið av veðrafløskum á marknaðin.

Veðraølið hjá Føroya Bjór stendur óivað í mongum kuldaskápi, hjalli ella bilviðførisrúi á ólavsøku. Men nú er alt so nógv lættari, sum tikið verður til.

Bryggjaríið hevur nevniliga sent veðrin á marknaðin í stórari fløsku. Hon er úr plasti og í henni eru 1,25 litrar. Stóra veðraølin var at fáa í Havn og í Klaksvík í gjár og fløskan kostar 34 krónur (við 5 krónum í panti).

Óivað verður nýggja støddin og sniðið hent hjá mongum. Men nú ber ikki longur til hjá monnum at siga við konuna við blonkum, mjúkum eygum: "Eg havi bert drukkið eina øl!", tí hetta hevur fingið heilt nýggja merking. Sama er galdandi, verður ein steðgaður av løgregluni.

Hinvegin heldur onkur óivað, at tað er somikið hugnaligari at verða boðin inn til vinmannin til eina øl.

Tað er vorðið alt vanligari við plastfløskum og hetta fer kanska at fríðka eitt sindur um, so færri brotnar og vandamiklar fløskur verða at síggja á ólavsøku.

